FØROYA REIÐARAFELAG

Tórshavn, 20. oktober 2025

Hoyringarskriv um uppskot til veðurlagslóg

Føroya Reiðarafelag hevur fingið uppskot til hoyring viðvíkjandi nýggjari veðurlagslóg fyri Føroyar. Endamálið við uppskotinum er í stuttum, at Føroyar skulu áseta sær bindandi veðurlagsmál, so útlátið av vakstrarhúsgassi minkar samsvarandi altjóða sáttmálum, sum Føroyar hava tikið undir við. Hetta merkir, at krav um netto null útlát í 2050 verður ásett í løgtingslóg.

Viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga, at tað ongar beinleiðis avleiðingar hevur fyri vinnuna. Ikki fyrr enn nýggir politikkir og virkisætlanir verða gjørdar, gerst greitt, hvørjar avleiðingarnar verða fyri vinnuna.

Hetta gevur greiða ábending um, at uppskotið fer at hava stórar avleiðingar fyri vinnuna og fiskiflotan, tá ið politikkurin verður settur í verk. Tó er ógreitt, nær hetta verður, hvussu hesin politikkur verður orðaður og hvørjar tær ítøkiligu avleiðingarnar fyri flotan verða.

Eisini verður sagt, at uppskotið ongar ásetingar hevur um avgjøld, skattir og gjøld. Tó loyvir Føroya Reiðarafelag sær at gera nakrar yvirskipaðar viðmerkingar til veðurlagslógina.

Væntast kann, at fiskiflotin verður ein týðandi partur av teimum átøkum, sum landsstýrið hevur í hyggju at seta í verk komandi árini. Tí er umráðandi, at umstøðurnar hjá fiskiflotanum verða eitt tungtvigandi atlit hjá landsstýrinum, tá ið møguligar virkisætlanir verða settar í verk.

Føroyski fiskiflotin er ógvuliga tengdur at olju fyri at reka sítt vanliga virksemið í fiskiskapi í øllum Norðuratlantshavi. Tí kann hetta kravið um netto null útlát hava stórar avleiðingar fyri fiskiflotan, tá ið hetta skal gerast til ítøkiligan politikk. Greitt er, at flotin er sera viðkvæmur yvirfyri broytingum í t.d. oljuprísi, og tí skal landið taka hædd fyri hesum, tá ið ein veðurlagspolitikkur verður settur í verk.

Greitt er, at einki annað alternativ til olju er tøkt hjá fiskiskipum í løtuni, og tað ganga væntandi mong ár, áðrenn nakað realistiskt alternativ er til olju hjá fiskiskipum. Tískil eru ongar grundgevingar fyri at áseta avgjøld fyri at minka um oljunýtslu hjá fiskiflotanum, tá flotin eingi alternativ hevur.

Reiðarafelagið hevur áður víst á, at landsstýrið og fiskiflotin eiga at loysa slíkar týðandi uppgávur í felag, soleiðis at flotin ikki stendur einsamallur við øllum trupulleikum, tá ið ætlanir landsstýrisins skulu setast í verk. Reiðarafelagið ber stóran ótta fyri, at soleiðis verður, tá ið veðurlagspolitikkurin verður settur í verk.

Veðurlagspolitikkur Føroya 2021-30 mælir til, at CO2 avgjald verður lagt alla á oljunýtslu hjá fiskiflotanum fyri at minka um oljunýtsluna. Eingin frágreiðing var tó um, hvussu fiskiflotin kann leggja um til grøna orku sum fylgja av hægri gjøldum. Tað hjálpir ikki flotanum at skifta skipini út við at áleggja

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

teimum hægri útreiðslur – tvørturímóti. Um ætlanin er at fremja hesar ætlanir krevst, at hædd verður tikin fyri umstøðunum hjá fiskiflotanum.

Viðvíkjandi útláti frá fiskiflotanum hevur tað stóran týdning, at eldri skip verða skift út við nýggj før við orkusparandi motorum. Tó er hetta munandi meira trupult, tá ið viðurskifti viðvíkjandi endurnýgging av veiðirættindum hanga í leysum lofti. Landsstýrið er áður gingið burtur frá lyftinum um, at loyvini skuldu vera galdandi í 10 ár, og nú er aftur ivi um hendan týðandi spurning fyri reiðaríini, ið hava ætlanir um at gera íløgur í nýggj skip.

Veiðigjøld hjá uppsjóvarflotanum og verksmiðjuskipum eru lutfalsliga munandi hægri enn í grannalondunum, og tað gevur eisini avbjóðingar viðvíkjandi útskifting av flotanum til ein meira nútímans og grønari flota.

Sáttmálaviðurskiftini millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini eru soleiðis háttað, at útreiðslur til olju antin heilt ella partvís verða drigin frá óbýttum hjá fleiri skipabólkum. Hetta merkir aftur, at dýrari olja til fiskiskip merkir størri frádráttur av felagsútreiðslum í avrokningum til føroyskar manningar, og tað merkir aftur lægri hýrur.

Føroya Reiðarafelag krevur, at øll uppskot til lóg og kunngerðir, sum verða gjørd við støði í hesi lóg, verða send felagnum til hoyring í góðari tíð og við fullfíggjaðum frágreiðingum um avleiðingar fyri fiskiflotan.

Stefan í Skorini, stjóri

Føroya Reiðarafelag